gult cyan magenta svart

Jólaskipi› leggur at í Vágsbotni

Jólamenn n‡ta meira og meira sjógvin sum farlei›, tá teir koma til arbei›is um jólini. Solei›is er eisini í Havn og jólamenninir byrja starv sítt sunnudagin, tá Jólaskipi› leggur at í Vágsbotni

JÓLASTÁKAN
Dagfinn Olsen

Jólamenn hava ikki sjóverk. Solei›is tykist ta› í hvussu er, tí ta› gerst alt vanligari, at teir koma til arbei›is sjóvegis. Kanska er ta› tí, at teir eru so væl hvíldir eftir 11 mána›ir í summarfrí, at teir ikki kenna til sjóverk.

Jólaskipini eru nú at síggja kring oyggjarnar og í Havn kunnu fólk taka ímóti jólaskipinum og jólamonnunum sunnudagin.

Jólaskipi› leggur at í Vágsbotni. Umbor› eru jólamenn, sum fara at spáka sær ni›an í Mi›b‡in at heilsa uppá stór og smá. Óiva› ver›ur stuttligt at taka ímóti og kanska hava teir okkurt gott í posanum.

Jólamenninir, sum starvast í Havn, leggja at í Vágsbotni sunnudagin klokkan 15.

Á hestbaki

Seinni í vikuni, tá jólamenninir eru komnir á pláss í Havn, fara teir at fer›ast á hestbaki. Jólamenn eru ikki óvanir vi› hestar og tí er ta› einki fyri hjá teimum at koma rí›andi í b‡in at heilsa uppá børn og vaksin.

Jólatónar í gøtunum og túnum

Jóladámurin er langt sí›ani komin. Handlar hava pr‡tt vindeyguni, fólk hava pr‡tt vi› ljósperum og gøturnar eru eisini ljósskr‡ddar. Men ta› er, sum vantar prikkurin yvir i'num. Nevniliga jólatónarnir, men jólatónleikur ver›ur at hoyra í gøtunum um jólini

JÓLASTÁKAN
Dagfinn Olsen

Hvat eru eini jól uttan jólatræ, jólamann, jólaljós og kanska eisini kava og gávur? Solei›is ver›ur ofta tiki› til. Men sanniliga eisini jól uttan jólatónar eisini kennast heldur tómlig.

Tó er ta› so heppi›, at hópurin av leikandi fólki er í Føroyum og nøkur teirra fara at seta dám á í gøtunum undan jólum.

Tey, sum vitja í Mi›b‡num í Havn og í SMS, sleppa t.d. at hoyra Havnar Ungdómshornorkestur. Hetta eru næmingar úr Tórshavnar Musikkskúla og ø›rum musikkskúlum vi›.

Dávur Magnussen er forma›ur í orkestrinum. Hann sigur, at eini 15 leikarar eru vi› og teir eru millum 9 og 15 ára gamlir. Hesir leika á øll hugsandi messingljó›føri, sum kunnu hugsast at vera vi› í einum hornorkestri. Orkestri› er eini 3 ára gamalt.

Fyrr hevur eitt slíkt orkestur veri› fyri ung. Hetta var kn‡tt at Havnar Hornorkestri, men so er ikki í dag. Havnar Ungdómshornorkestur er sum so ein sjálvstø›ugurbólkur.

– Skráin hjá orkestrinum kan ikki sigast at vera so krevjandi, um ein hugsar um, hvat krevst av leikarunum. Men gó›ur tónleikur er at hoyra og sjálvsagt jólatónleikur, nú ta› stundar til jóla, sigur Dávur Magnussen, forma›ur í Havnar Ungdómshornorkestri, sum fer at leika í Mi›b‡num og í SMS undan jólum.

Heitir tónar

Onnur, i› fara at lata tónarnar hita køldu vetrarluftina í Mi›b‡num, er t.d Rútmiska Kóri›, GHM, Cantabile og Frelsunar Herurin.

Her kann leggjast afturat, at mong hava stu›la› Frelsunarherinum í átakinum at fáa heimleysum tak yvir høvdi› og innsavningaríløtini kring landi› tykjast ikki standa svong. Og jólini er árstí›in, tá heimleys og einsamøll kenna seg mest sleptan á fjall, hóast jólini eisini snúgva seg um næstrakærleika og felags hugna. Vert at hava í huga, nú øll renna kapp vi› klokkuna, jólastákanina og gávukeypini.

Hví ikki leita sær í b‡in at lurta eftir fløvandi og livandi jólatónum, nú dagarnir

Tilbo›ini eru galdandi í ni›anfyri standandi handlum Føroya Keypssamtøku leygardagin og sunnudagin

Anthon Berg Konfekt special selection 200 gr.
39,95

Quality Street karamellur 1,8 kg
179,00

Svenskar dunnur fyri kilo
59,90

MERRILD KAFFI 500 gr.
19,95

fk
Keypssamtøkurnar
• í Klaksvík
• vi› Skálafjør›in
• í Hoyvík
• í Tórshavn
• í Trongisvági
hava opi› sunnudagin til kl. 20.00

SKEMT 2000

fæst í sølubúðunum kring alt landið
Kostnaður 120,-

Nú er møguleiki fyri at ogna sær allar
12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum
fyri einans 650,- kr.

Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20

Vit ynskja øllum viðskiftafólki okkara eini gleðilig jól

parfumarí
Drós
Áarvegur 6 • Tel. 314811 • Fax 318956

Blunda og ímynda tær hana í tí besta...

tað kann gerast veruleiki!

100% silki

siri
liv & heilsa

Dr. Jakobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Ert tú góð við hann?

sunnudagin er opið frá kl. 14.00 til kl. 20.00

Handilin er fullur av klæðum frá innast til uttast – sjálvandi hava vit eisini jólagávuna!

Alt til dreingin, tann unga og meira tilkomna mannin

Kallkyn
Vágsbotnur • Tel. 31 62 06